DAGSINS MEINING

Fólkið vil hava B og C vitaminir

Eins og undan seinasta vali hevur Sosialurin saman við Fynd og í samstarvi við Føroya Tele gjørt eina stóra veljarakanning. Tað eru næmingar úr studentaskúlanum á Kambsdali og við HF-skeiðið í Klaksvík, sum hava spurt umleið 3000 veljarar í øllum teimum sjey valdømunum. Í mun til tær veljarakanningar, sum vit javnan hoyra um, so er henda so nógv størri. Til tær minni kanningarnar verða millum 400 og 500 fólk spurd.

Nú skulu allar veljarakanningar takast við fyrivarni, men neyvan kemur ein nærri einum valúrsliti enn við so stórari kanning. Men av tí at flokkar liggja so tætt ir í fleiri valdømum kann tingmannabýtið sjálvandi broytast. Og bara ein lítil broyting í tingmannatalinum kann geva heilt aðrar samgongumøguleikar.

Sambart kanningini, sum varð gjørd á HF-skeiðnum og hølunum hjá Føroya Tele í Klaksvík hóskvø ldið, missir samgongan sín meiriluta. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fáa 18 tingfólk og harvið avgjørdan meiriluta. Taka vit einstøku flokkarnar er stóri vinnarin Sambandsflokkurin og stóri taparin Tjóðveldisflokkurin Sambandsflokkurin fær 10 tingfólk. Næstur honum er Javnaðarflokkurin við 8 tingfólkum. Fólkaflokkurin fær 6 tingfólk og Tjóðveldisflokkurin somuleiðis 6. Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin fáa hvør sín løgtingslim. Stuttligi flokkurin er ov stuttur.

Hyggja vit nærri at valdømunum sæst, at her er sera tætt millum fleiri av flokkunum. Eitt nú í Vágum, í Norðoyggjum, í Norðstreymoy, Sandoynni og í Suðuroynni. Stóri spurningurin er, um tað eydnast B at fáa umboð í Norðoyggjum, og um flokkurin klárar at fáa tvey umdømisvald í Vágum og í Suðri. E stendur so til at missa umdømisvald bæði í Suðri, Sandoynni og í Suðurstreymi men kann so vinna aftur umboð við eykavaldum.

Einki er at ivast í, at tað er óttin og ótryggleikin, sum undanfarnu samgongur hava skapt,ið fáa veljarar at streyma í hitt borðið, serliga tilB. Áhugaverdi spurningurin er so, um tað fer at eydnast C at lofta fleiri av hesum veljarum. Tí verður tað sera áhugavert at fylgja valstríðnum og vita, um tað fer at eydnast C at draga til sín nógvar av teimum óttafullu veljaranum, sum fullveldisrákið hevur skapt. Er tað hugsandi, at C við at vísa á stabilietet heldur enn svart kontra hvítt (antin ella) politikkin hjá B kann fáa so frægt av veljarum aftrat, at hann verður líka stórur sum B ella størri – um tølini laga seg so – tvs. um hann verður so heppin at klára at vinna mest møguligar umdømisvaldar td. at vinna mannin aftur í Norðstreymi, fáa annan mannin í Vágum og triðja í Suðri. Tá verður hann brádliga stóri vinnarin. Hetta man vera ein ynskistøða hjá Javnaðarflokkinum.

Men tølini, marginalarnir kunnu eisini gera, at B fær 11. mannin. So sluttspurturin í valstríðnum kann væl gerast ein kampur millum B og C um at fáa flestu og mest biligu tingmenninar. Neyvan fara A og E bara at standa og hyggja at men gera alt fyri at fáa tær atkvøðurnar,ið resta í at fáa serligu biligu tingmenninar í sín lut. Alt bendir á, at vit fáa eitt dramatiskt og sera spennandi val.

Nú er ein vika til valið. Einki er at ivast í, at veljarakanningin, sum vit í dag kunngera, fer at ávirka. Spurningurin er so, hvørjum hon fer at taka luftina úr, og hvør fer at fáa eyka vind í seglini. Týsdagin fáa vit at síggja, hvussu stórar broytingarnar hava verið, síðani fólkið talaði í stóru kanningini hóskvøldið.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Nýársheilsa Meinhards

Jóhan Carl Dam

Nýársheilsa Meinhards Jacobsen til føroya fólk og serstakliga til flakakvinnur: tit eru ódugnaligar, seinar og dovnar sammettar við útlendska arbeiðsmegi, sum sambært lovprísingum hansara helst eru Guðs gáva til flakavinnuna.

Hann skal hava loyvi at halda tað hann vil, men slíkar niðurgerandi og mannminkandi niðurstøður eiga ikki at fara framvið uttan eina viðmerking.

Ein er noyddur at seta spurningin: Hvat liggur aftanfyri eina slíka útsøgn? Er tað bert lovprísingin/-niðurgeringin í sjálvum sær? Ella býr annað undir - kanska ein kensla av at hann sjálvur ikki er førir fyri at fáa sum frægast burtur úr tí starvsfólki og virki, hann sum leiðari hevur átikið sær at fyrisita?

Leiðslunnar krøv um nøgd heldur enn dygd er hitt vælkenda umkvæðið. Um ein sammetir skeringina hjá eini miðal føroyskari flakakvinnu ímóti eini miðal útlendskari er úrslitið helst tað, at dygdarvøran (hóast minni nøgd) í longdini gevur tann betra prísin, og harav fylgjandi betri marknaðaðarsømdir. Meinhard eigur ikki at undirmeta at slíkar útsøgnir sum hansara fáa keyparnar at halda eyguni eftir um henda føroyska framleiðslan nú er so góð, sum ljóðar. "Skjótt er skitið verk", sigur orðatakið! Eisini henda neyðin at fáa fólk at arbeiða við akkordferð fyri tímaløn eigur at havast í huga.

Er tað ikki í veruleikanum so, at áðrenn arbeiðsfólkið og avgreiðsla av teirra løn verður tikið við, skal leiðslan hava í posa, sekk og reyvalumma?

Mær rennur í huga hvussu t.d. táið ein bjarging á opnum havi er farin fram, har er fordeilingin henda:

Reiðaríið fær eina helvt - 50%
Skiparin 25%
Manning t.d. 30 mans, fáa 25% at deila

Sama ger seg galdandi innan flakaframleiðsluna, har virkisleiðari hevur fingið (fyri eitt ár) 1 millión í bonus av tí, at hann var serstakliga dugnaligur at "fáa væl burturúr"! Meira sjálvsagt hevði verið at luta hetta avlopið yvir á arbeiðsfólkið!

Skal føroyskari framleiðslu (á øllum stigum, eisini innan tað almenna) vera lív lagað, skal farast inn á skúling av arbeiðsfólki frá fyrsta degi av.

Yvirdosis av C-vitaminum

– Vegna grein hjá John Johannessen (gev tónleikinum c-vitaminir)

Rógvi á Rógvu

John Johannessen tosar um at menna tónleikin eitt nú við at stuðla og marknaðarføra føroyskan popp tónleik til útlendskan marknað, tað haldi eg at vit skulu lata plátufeløg taka sær av. Tað er rætt at brúk er fyri meira stuðuli til at menna tónleikin og tónleikaumstøðurnar, men skal tað gerast rætt, skal tað stuðlast her heima. Tónlistin skal stuðlast, og má tann skapandi listin verða í hásæti og hava frælsi til at mennast til tað hon vil, uttan nakra politiska ávirkan, so fáa vit eina serstaka og fjølbroytta tónlist á einum høgum stoði sum er til gagns fyri øll, eisini politikarar.

Tað hevur stóran týdning at góðar arbeiðsumstøður verða skaptar fyri tónleikarar her heima, fleiri venjingarhølir fyri bólkar og einstaklingar, ein enn betri musikkskúla, og ikki minst tónleikapallar (konserthús og arbeiðspláss fyri tónleikarar), har tónleikarar og áhoyrarar kunnu mennast. Hettar er ein breið og effektiv loysn sum fer at geva stórt listarligt avkast, og tá kunnu vit saktans reypa um eina ríka tónleikamentan.

Viðmerking til Katrin Petersen, tíðindaleiðara í SvF

Elisabeth Guttesen

Nei Katrin Petersen, eg rokni ikki við - uttan annars at kenna til, hvat Jón Tyril meinar og ikki - at hann **ikki** heldur, at valdømissendingarnar skulu vera kritiskar, tað rokni eg við, at tey allarflestu vilja. **Men** at verða so áleypandi sum verturin Øssur Winthereig er, er út um alt mark, tí tit, sum arbeiða í SvF, eru jú tey professionellu (og eisini uttan lampufepur), men mong av teimum, sum eru við í sendingunum hjá tykkum, skulu kanska fyri fyrstu ferð í sjónvarp, og piprast sikkurt eitt sindur. Tað má vera sera óbehagligt, at so verturin næstan leypur á tey. Fyri mær virkar tað, sum at hann hevur eitt endamál,, og tað er at tippa munnin á teimum og sjálvur vera tann, sum er í fokus. Og hóast hetta ikki skuldi verið meiningin hjá honum, so er tað tann uppfatan, vit vanligu hyggjarar hava. Havi verið saman við eitt sindur av fólki seinastu dagarnar í ymiskum samanhangum, og tosið er hvørja ferð komið inn á hesar sendingar, og útrykkini eru m.a. "forferdiligar sendingar".

Eitt aftrat Katrin Petersen. Man kann gott vera kritiskur og tó hóligur. Tað eru tíbetur nógvir aðrir journalistar, sum eru tað.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

PM Føroyar:

Nýggjur handil og umvælingarverkstaður

1. november 2003 lat ein nýggjur handilin og umvælingarverkstaður upp í Jansstovugøtu í Havn.

Tað eru teir báðir Bjarni Poulsen og sonurin Rói, sum eiga og reka fyritøkuna PM Føroyar.

PM Føroyar umboða Peugeot skutarar og umvæla øll onnur merkir. Eisini gera teir allar vanligar umvælingar av súkklum og knallertum. Umframt tað hava teir hjálmar, handskar og alla vanliga útgerð og eykalutir. Bjarni og Rói hava eisini fyritøkuna HEBO.

Handilin er í Jansstovugøtu, tætt við SMS, millum R.C. Effersøesgøtu og Tinghúsvegin. Fyrr hava Volvo Penta og Vevstovan hildið til í somu hølum.

Bjarni hevur annars í fleiri ár arbeitt sum húsasmiður. Eina tíð rak hann súkkluhandilin hjá André Andrésen í Varðagøtu. Eisini hevði hann Skómakarin við Hoydalsvegin. Rói gongur í løtuni á Føroya Handilsskúla og er í handlinum eftir skúlatíð.

Handlinum er opin gerandisdagar frá 10-17.30, leygardag er stongt.

PM stendur fyri Peugeot Motorcycles.

Fiskaklettur ásigldur og sakk í 1974

Fyri 30 árum síðan, í januar 1974, fór hendan hending fram innan fyri Molan í Havn

Eingin mansskaði hendi, tá 50-tons báturin Fiskaklettur av Oyri, sum var á veg inn á Havnina, varð ásigldur tætt innan fyri Molan av farmaskipinum Arnatindi, sum var á veg úteftir.

Stoyturin hendi um skottið millum maskinrúmið og lastina. Tað eydnaðist manningini á Fiskakletti at bakka bátin inn at Molanum og leypa upp á land við endum, áðrenn báturin sakk niður við bryggjuna.

Kelda: Myndaárbókin árið í fór 1974

Dagurin

13. januar. Tjúgunda halgi. Jólini enda. Táið tey taldu jólini og kvóðu um alt tað, sum Sankta Mortan gav, kvóðu tey: tjúgu stútir, nú eru jólini úti. Tjúgunda kvøld hevur verið hildið sum høgtíðsdagur onkustaðni í Føroyum. Dagurin verður í álmanakkanum eisini róptur **Hilarius**, til minnis um ein biskup í Poitiers,ið var mettur sum kirkjulærari og sálmaskald. Hann hevur yrkt sálmin: *Tær Guð, sum eina ræður himni á.* Doyði í árinum 367.

Til minnis um okkara kæra mammubeiggja

Wenningsted Eli Hansen

23.august 1949 - 8.mai 2003

Tung vóru boðiniið vit fingu 8. mai. Vit fingu at vita at tú okkara kæri mammubeiggi, var tikin frá okkum sera óvæntað. Tú og tveir vinmenn vóru farnir ein túr, men hvør skuldi trúð at hettar var tín seinasti túrður. Tit høvdu planir um at ganga til Skopunar eftir hamrnum á Sandi, men teir komu fram í øllum góðum, men tú Wenningsted kom ikki fram, tú vart dottin oman og var funnin deyður bert 53 ára gamal. Táið vit fingu hettar at vita stóðu vit spyrjandi, hví Wenningsted ?

Hettar er ein spurningurið vit ikki fáa svar uppá, men ein meining er við øllum her í lívinum, og vit vita at vit skulu heim í Himmalin ein dag, og júst hendan dagin hevði Harrin brúk fyri okkara mammubeiggja.

Men góði Wenningsted, tú hevur altíð týtt nógv fyri okkum allar, og fyri okkum øll á Strondum, tað kom kanska av, at eina tíð búði tú her hjá okkum, tú arbeiddi á Skipasmiðjuni á Skála tá, vit hava altíð verið so góðar við teg. Tú vart altíð so smílandi og glaður, og oftani tá tú ringdi norð til mammu og tey, fekk man eitt gott prát við teg. Vit hava allar haft nógvar og góðar samtalur við teg, og hettar kemur nokk at merkjast sum ein stórur saknur, at tú ikki fer at ringja.

Vit minnast allar at mamma plagdi at fara til Skopunar at ferðast, hon hevði altíð okkum allar fimm við. Tað eru nokk serliga vit eldru, sum minnast allar teir góðu og stuttligu túrarnar, og hvussu vit plagdu at goyma okkum fyri mammu, tá tað skuldi farast norður aftur, men hesa seinastu tíðina hava vit ikki verið so nógv har suðuri, tað kom nokk av, at abbin doyði í 1987. Tá var ikki tað sama at koma suður, tú tókst jú við útróður og annað og var ikki so nógv heima. Men undarligt er at hugsa sær, at tú ikki er ímillum okkum meira, nú ert tú heldur ikki at vitja í Skopum, so nú er ikki nógv eftir har, jú vit hava nógv góð minnir at líta aftur á saman við tær Wenningsted. Eitt sum vit fara at sakna ógvuliga nógv, er, tá vit plagdu at koyra við húsini á Áarbakkanum, og tú vart í vindeyganum, og rópti okkum inn, tað var altíð so hyggeligt at koma inn í barnaheimið hjá mammu.

Okkara kæri mammubeiggi, tað var tungt at fylgja tær til tín seinasta hvíldarstað, tú vart ein nógv avhildin maður, tað sóu vit á tí stóra skara sum fylgdi tær út í kirkjugarðin. Tað eru nokk nógv sum sakna teg góði, men vit mugu øll víðari í lívinum, men teg gloyma vit ikki Wenningsted, tað er so tómt, nú tú ikki er ímillum okkum meira, men vit møtast øll aftur ein dag.

"»Góði Wenningsted. Takk fyri alt tú vart fyri okkum og alla familjuna. Vit sakna teg, tað er so undarligt at hugsa sær at vit ikki meira kunnu fara at vitja teg. Men vit vita eisini, at ein dag síggjast vit øll aftur.«

Sov søtt, á vinur, sov og hvíl teg nú !
vit vildu, tú hjá okkum skuldi búð ;
men tryggari hjá Jesusi ert tú -
farvæl, farvæl, farvæl.

Farvæl, farvæl, men ikki ævigt, nei !
ein stuttan dag, eitt lítið tíðarskeið,
so hittast vit, har skilnaður ei er,
og inntil tá - farvæl !

Má Harrin styrkja og troysta okkum sum eftir sita, og góði Egin Fríði og Edith tit hava mist ein góðan pápa og drong. Og til tykkum mamma, gumman og Jaspur tit hava mist ein góðan beiggja, og vit øll sum hava mist okkara mammu- og pápabeiggja, og børnini sum hava mist ein góðan ommubeiggja.

Hvíl í friði góði Wenningsted !

Rigmor, Maria, Kristina, Sólfríð og Jóhanna